# Álvaratos CHE(D) hvat hugsa tit fyri tykkum ??

**JOHAN DAHL**

løgtingsmaður



Nú hava tit hildið Føroya fólk fyri spott í gott 7 mánaðir - tað mátti verið nokk, men so er ikki.

Hóast Tobbi meldadi hart út m.a. í beinleidis sending í sjónvarpinum, at hann fór frá um hann ikki fekk sín politikk og sína skerjing ígjøgnum á fiskivinnuøkinum, - so bakkaði hann aftur hesaferð.

Ikki tí – eg hevði ikki væntað annað tað er honum so líkt , - ein stórur orðavavstur, - retorikkur á høgum støði við gullkornum frá Decartes, Sokrates og øðrum góðum monnum, men so er eisini alt sagt.

Tjóðveldi og Høgni formaður, hevur sínt í verki, at teir eru ikki til at líta á hvørki í orð ella gerningi - bert tos, hóttanir og ørvitisuppskot sum verða tveitt fyri Løgtingið – tað hava vit sæ seinastu vikurnar og nú kom so prikkurin yvir i'ið - blokkurin skal skerjast nú vid 117 milliónum sambært Karsten Hansen fyrrv. Tjóðveldistingmanni.

Karsten Hansen fíggjarmálarádharri ger greitt at hann leggur blokkniðurskurðin fyri landsstýrisfund i komandi viku.

Her á verða okkurt álvarsliga sligið klikk fyri samgongu og hjálparflokki teirra.

Samgongan og hjálparflokkruin mugu hava mist alt sum eitur jørðforbindilsi og sær tað ikki út til at teir vita hvat rørir seg í samfelagnum - tað er harmiligt og vandamikið fyri samfelag okkara.

Vit hava trupulleikar, innan fiskivinnuna og merkir tað alt annað líka, minni inntøkur á øllum frontum - eisini til landskassan.

Tey eldru fáa ikki endarnar at røkka saman orskað av høgum olju – og matvøruprísum

Ungu familjurnar fáa neyvan heldur endarnar at røkka saman orsaka av hækkadu oljuprísunum, matvøruprísum og rentuhækkingum.

Javnaðarflokkurin - hvat í allari víðu verð hugsar hann fyri sær?

Tað sær ikki út til at verða gingið upp fyri teimum enn - at tey eru vit at avreiða flokkin og restina av javnaðarpolitikkinum fyri ein løgmannsess?

Meðan framhald av Sirkus Tinganes sær út til at halda áfram – bíða vit í spenningi upp á at næsta politiska sjálvmorðsuppskot frá samgonguni - blokkniðurskurðurin verður settur á dagskrá.

# 117 millióna blokkniðurskurður er ørskapur

**KAJ LEO JOHANNESEN**

Sambandsflokkurin



Ein avleiðing av, at landsstýrið ætlar at lækka blokkstuðulin við 117 mió. krónum, verða skatta- og avgjaldshækkingar.

Løgmaður hevur boðað frá, at CHE-samgongan heldur fram við Sjálvstýrisflokkinum sum stuðulsflokki. Samstundis er greitt, at eitt av málunum á skránni fyri fyrsta landsstýrisfundin hjá minnilutalandsstýrinum er blokkniðurskurður á 117 mió. krónur.

Inntøkur landskassans eru í høvuðsheitum avmarkaðar til skatt, avgjøld og blokkstuðul. Skal ein av hesum inntøkunum minka, so mugu hinar vaksa. Men hvat fær landsstýrið at trúgva, at skattur og avgjøld fara at vaksa av sær sjálvum í 2009? Vinnan er í svárum trupulleikum og hetta sæst aftur í skattainntøkunum, og nógv bendir á, at tann stóri búskaparvøksturin, sum hevur lívgað landskassan við avgjøldum tey seinastu árini, er hasaður av á hesum sinni.

At samtykkja skatta- og avgjaldshækkingar er at leggja stein omaná byrðu hjá húsarhaldunum, nú húsarhaldsvørður og olja eru sera nógv dýrka. Men onkrastaðni skal landskassin hava sínar inntøkurnar frá, og vil landsstýrið ikki hava blokkstuðul, so verða tað Føroya fólk, sum mugu gjalda.

Landskassin hevur longu undirskot í verandi ári, og alt bendir á, at undirskotið verður størri í 2009. Skulu so hesar 117 milliónirnar trekkjast frá á inntøkusíðuni, verður støðan ikki góð.

Undan valinum tosaðu øll um tey bleytu virðini, men fer landsstýrið at lækka blokkstuðulin og ístaðin at hækka skatt og avgjøld, so verður lítið eftir hjá teimum veikastu í samfelagnum.

Eg vil tí heita á løgmann um at steðga landsstýrismanninum í fíggjarmálum við ætlanunum um at minka blokkin.

# Framá við Frælsinum!

**KÁRI Á RÓGVI**

løgtingsmaður

Læraradeildin á lærda háskúla okkara hevur júst nú tikið knappliga hundrað fólk upp. Góða eydnu til teirra; hjartans tøkk til teirra, ið skipaðu fyri.

Leiðslan á skúlanum, lærarar, verandi mentamálaráðharri Kristina Háfoss og ikki minst fyrri landsstýrismaðurin Jógvan á Lakjuni eiga øll rós fyri at rudda slóð í føroyskari mentan.

Hetta hendir samstundis sum sera spennandi útbúgvingar byrja aðrastaðni á Fróðskaparsetrinum.

Vit eiga at fegnast um, at fleiri føroyingar fáa góða og viðkomandi útbúgving, fleiri ungfólk verða verandi í landinum og ríka lívið fyri okkum onnur, fleiri føroysk børn alast upp á Føroya steini, fleiri kundar í handlunum, og fleiri dugnalig fólk verða tøk á arbeiðsmarknaðinum.

Nú er at vóna, at vit fáa boðið út enn fleiri lestrarpláss næsta ár, so allar vanligar útbúgvingar kunnu fáast her. Fólk kring landið, eisini tey ið hava arbeiði, mugu sleppa at taka føroyskar útbúgvingar sum fjarlestur. Tey, ið hava tikið grundútbúgvingar uttanlands, mugu kunna enda útbúgvingina her heima. Tey, ið vilja sleppa uttanlands, mugu hava møguleika at byrja í Føroyum og síðani fara í styttri og miðvísari skeið av landinum uttan at verða skrikt upp við rót; nakað sum sjófólk okkara mangan hevur verið burturstatt uttan tó at ivast í, hvar heimið kortini var.

# ........ í meðan bresta "kinesarar" í Føroyum

**JÁKUP DANIELSEN**

Politiski leikurin í longum talvi eru mangir og vit, sum síggja og lýða á, hava lyndi til at halda, at innihaldið í tí sum kjakast verður um, gerst alt torskildari. Í hesum døgum, meðan ítróttarfólk eru savnaði til olympisku leikirnar í Kina, bresta "kinesarar" í Føroyum. Onkur vil bresta hol til Skopunar, meðan onnur vilja bresta tað sindrið av samgongu vit hava í Føroyum.

Politiska skipanin stendur fyri skotum, og meðan fólk sum frægast royna at renna undan skotum – nú eisini á Argjum – tykist tað at verða torført at skapa politiskan stabilitet í Føroyum.

Politiska landslagið hevur verið darvað av, at einstaklingar vilja fremja einstøk mál, sum fyri ein hvønn prís, skulu fremjast.

Vit trivla okkum fram og vóna, at allur hesin roykurin, sum stendst av skotunum, hevur okkurt endamál, ella skulu vit óttast at politiska skipanin fjalir útyvir nakað?

Vit kunnu bara staðfesta, at alt ov lítið kjak er um týdningarmiklar tættir í tí føroyska vælferðarsamfelagnum. Hetta er ikki bara galdandi fyri løgting og landsstýrið, men so sanniliga eisini í tí politiska umhvørvinum sum heild. Vit eygleiða tann politiska sjónleikin sum verður sýndur og undrast yvir illa uppsettu pallmyndirnar.

Eisini undrast vit yvir, at hóast nógv orð verður nýtt, er so lítið samskifti.

Skulu vit ikki taka okkum saman?